DAGSINS MEINING

Eitt veruligt føroyskt sjónvarp er ynskiligt

Nú hava allir teir stóru flokkarnir í fjølmiðlunum sagt frá, um teir eru sinnaðir at játta Sjónvarpi Føroya pening á figgjarlógini. Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin siga ja. Sambandsflokkurin ivast, men hellur óivað tann vegin at siga ja. Men Fólkaflokkurin sigur helst nei. Í øllum førum sigur formaðurin hjá tingmanningini og í figgjarnevndini, Óli Breckman, í samrøðu við Sosialin týsdagin, at Fólkaflokkurin vil neyvan hava SvF á figgjarlógina.

Málið hevur tikið seg upp, eftir at Føroya Tele við nýggja Televarpinum helst kann fara at máa grundarlagið undan SvF. Tað nýggja Televarpið sendir somu ræsur beinleiðis, sum SvF sendir seinri. Samstundis hevur sjónvarpsstjórin alment boðað frá, at skal SvF røkka endamálið sínum um føroyskar sendingar og føroyskan tekst á útlendskum sendingum, skulu 70 mió.kr. til.

Hetta er nógvur peningur, og tað er ikki løgið, at summi hveppa seg við. Men spurningurin er, um ein nógv minni peningaupphædd ikki hevði hjálpt munandi. Ein annar spurningur er eisini, um ikki tað er neyðugt við eini hugburðsbroyting í SvF til programmpolitikk, starvsfólkapolitikk og nýggja tøkni.

Teir flestu føroyingar eru samdir í, at vit skulu hava eitt føroyskt sjónvarp. Hóast fólk ofta illneitast inn á SvF, halda fólk flest, at tað er gott at hava eina føroyska sjónvarpstíðindasending og føroyskar sendingar. Dagur og Vika gav Útvarpi Føroya kapping, og tað sæst og hoyrist sanniliga á tíðindaflutninginum, eins og kappingin millum loftmiðlarnar hevur eggjað bløðunum til ein betri tíðindaflutning. Harafturat eru tey flestu óivað fegin um føroykar sendingar í SvF – bæði einstakar sendingar, t.d. úr náttúruni, dokumentarsendingar, t.d. um bankamálið, og sendiróðir, t.d. um olju og tuberklarnar, sum SvF borðreiddi við fyri fleiri árum síðani. Tí halda óivað tey nógvu, at SvF eigur at fáa játtan til føroyskar sendingar á figgjarlógini.

SvF kann ikki kappast við altjóða ræsur, og Føroyar eru eitt lítið land til eitt stórt sjónvarp. Men vit hava vant okkum til at hava eitt føroyskt sjónvarp, og vit vilja framhaldandi hava eina – helst betri – føroyska tíðindasending, føroyskt orðaskifti o. a., eins og sendingar um føroysk evni, tí tær gera hvørki BBC, Sky, CNN ella ITV. Hinvegin mugu vit eisini gera okkum greitt, at fær SvF pening, er skeivt at lata ÚF sita eftir. Henda støðin, sum er bíligari at reka, átti at fingið eina játtan, so vit fingu fleiri og frægari útvarpssendingar, t.d dokumentarsendingar, sum saknur er í. Men áðrenn vit koma so langt, eiga vit at hava eitt veruligt orðaskifti, ikki bara millum poltikkarar, men eisini millum fjølmiðlafólk, um verandi sjónvarp, tí ynskiligt er ikki bara at hava eitt føroskt sjónvarp, men eitt frægari føroyskt sjónvarp.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Eitt politiskt sniðálop á løgmann

Vagnur Michelsen

Øvundsjúka og klandur trívast væl í Føroyum. Er friður eina løtu og einki er at klandrast og keglast um, so skulu einstaklingar og fjølmiðlar nokk syrgja fyri, at alt fer upp at gáka aftur. Málið millum løgmann og Tórbjørn Jacobsen er eitt dømi um hetta.

Tað var eitt mannminkandi politiskt sniðálop, tá ið Tórbjørn Jacobsen í eini grein gróv framaftur eina flyting, sum Anfinn Kallsberg løgmaður gjørdi fyri 20 árum síðani. Talan er um eina upphædd, sum Anfinn í árunum 1977-1982 flutti frá P/F Frostvirkinum til tvey partafeløg, har hann sjálvur var stjóri og partaeigari.

Sambært eini grein í Sosialinum endaði hendingin í sátt og semju í 1982, og hví í allari víðu verð skulu Tórbjørn og fjølmiðlarnir á ódámligan hátt gera so nógv burturúr eini hending, sum er farin fram og endaliga avgreidd fyri 20 árum síðani.

80 árini vóru serlig í Føroyum, og í 80 árunum bar alt til. Mangt fór fram í 80 árunum, sum ikki toldi dagsins ljós. Glansitíðin endaði við, at landið fór á húsagang og 5000 fólk máttu rýma frá húsi og heimi. Landið misti 100 tals milliónir, tí ivingarsom veðhald vórðu latin skipum og virkjum.

Seinni vóru vit vitni til sakarmál og ákærur ímóti persónum, sum møguliga høvdu yvirfiggjað nýggj skip, men eingin bleiv dømdur og mongu ákærurnar vórðu sleptar.

Dómarin segði í eina skipamálinum, at politiski myndugleikin var vitandi um, hvat fór fram í 80 árunum.

Hví skal so ein 20 ára gomul hending um eina flyting nú knappliga dragast framaftur í fjølmiðlunum? Hetta er ússaligt og mannminkandi ímóti okkara løgmanni.

Skilji púrt einki av hesum, tí síðani hendingina fyri 20 árum síðani hevur Anfinn Kallsberg bæði verið landsstýrismaður og løgmaður. Sambært meiningarkanningum vilja flestu føroyingar jú hava Anfinn sum løgmann, og í løgmansstarvinum hevur Anfinn verið bæði hampiligur og siðiligur.

Jú, tú skilir sjálvandi, at andstøðubløðini og andstøðupolikararnir brúka støðuna, tí tað er ein partur av politiska spælinum at fáa hálað teppið undan løgmanni og sjálv sleppa fram at politisku leiðsluni í landinum.

Men nógv við mær halda eins og løgmaður, at løgmaður hevur fingið eina ringa viðferð í sjónvarpinum. Okkurt innslag í sjónvarpinum um flytingina var beinleiðis pínligt, og tú spurdi teg sjálvan, hvat endamálið var at leita fram gamlar myndir úr bandasavninum.

Tað eru nøkur av okkara tíðindafólkum, sum trívast best, tá ið tey viðgera tað negativa í samfelagnum. Tey hava ikki evnini at bera eyga við tað positiva og finna ikki sólskinssøgurnar, sjálvt um sólin í vikur hevur skinið bæði oman og niðan, og búskaparfrøðingarnir boða frá góðum byri í Føroyum næstu árini.

Sjálvandi skuldu fjølmiðlarnar havt latið teir tveir setningarnar hjá Tórbirni Jacobsen í blaðgreinini farið aftur við borðinum. Setningarnir høvdu ikki annað uppiborið, og Tórbjørn hevði ikki fingið so nógva umrøðu, sum hann trívist so væl í.

Tórbjørn Jacobsen hevur annars góðar og spennandi hugsjónir og dugir væl at skriva, men hann skikkar sær ikki nóg væl á politiska leikpallinum enn.

Nú er málið um flytingina vorðið so politiskt og groteskt, at fjølmiðlar og politikarar tosa um eina grein 19 kanning. Álvaratos, er hetta ikki ov langt úti, og er málið ikki farið út um øll menniskjalig mørk.

Vit eru nógv í Tjóðveldisflokkinum sum er vónsvikin, tí hvar er »flokssdissiplinin« í flokkinum, tá ið eitt so lítið mál kann koma so langt, at málið kann slíta samgonguna. Hvat er tá vunnið.

Havi altíð havt fult álit á løgmanni Anfinni Kallsberg. Fái ikki eyga á nakran annan persón í landinum, sum so siðiliga og hampiliga megnar løgmansuppgávuna betur enn Anfinn. Løgmaður er tíverri viknaður í fullveldismálinum, men tað er ímóti hansara egna vilja. Sambandsvongurin í Fólkaflokkinum við Óla Breckmann, Bjarna Djurholm og Jørgen Niclasen á odda er í løtuni ov sterkur.

Nú skuldu fjølmiðlarnir og politikararnir einaferð med alla slept málinum um flytingina hjá løgmanni á sinni. Fólk hvørki tíma ella orka at lesa og hoyra meiri um Anfinn, Tórbjørn og P/F Frostvirkið.

Nýtið heldur tíðina og orkuna til meira positivt politiskt virksemi, millum annað gullið og grønu skógirnar, sum politikararnir lovaðu teimum gomlu áðrenn løgtingsvalið í vár. Á hesum økinum er nógv at tríva í.

Samfelagstaparar í Føroyum!

Hans Birgir Hansen
Mr. Big

Menniskjan klárar ikki at kappast við teldur/maskinur, ið koma at økja munandi um stagnatión og gera allar føroyingar til samfelagstaparar, ið missa sítt livibreyð.

Tað er bara at hyggja at robott føroyingum í øllum aldri/samfelagsbólkum/stætt um, ið gerast samfelagstaparar, tá ið øll kroppslig arbeiðsmegi verður avtikin.

Ræðuligt er at staðfesta at álvarsligt er áfatt við øllum, ið liva sum arbeiðandi trælir hjá stórkapitalistum, ið eru kriminellir lógloysingar úti á arbeiðsmarknaðinum.

Tað er nógv fyri at korruptión/mutur/samansvørjan merkir dóms/politi/löggávuvaldið í Havn og tann rikna politikk á løgtingi og í bygdar-/býráðum.

Tað er ikki mætari við øllum børnum/ungdómum/tilkomnum á dagstovnum/skúlum/lærustovnum/viðgerarstovnum/heimum, ið gerast samfelagstaparar.

Tað gerast allir samfelags avvíkjarar/samfelagstaparar og øll í falla fyri rúsdrekka/rúsevnis/heilivágs/tubbaks misnýtslu, ið slept vera upp á fjall í dag.

Tað einasta, sum hevur áhuga innan kunningar og samskiftistøkni er at skapa mest møguligan profitt/vinning, til partaeigarar í KT-fyritøkum.

Sosialurin
Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Jústinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Føroyar áðrenn Afrika

John S. Myllhamar

Tað er bæði ólogiskt og óbíbilskt at tosa um kærleika og missión út í heimi, um vit ikki fyrst megna at fremja tað heima í Føroyum. Er ikki vant dúgliga á heimavølli, man lítil dugur vera í á útivølli.

Við støði í missiónsboðunum soleiðis sum Lukas evangelistur hevur givið okkum tey, at í Jesu navni eigur at verða prædika umvending og fyrigeving syndanna fyri øllum fólkasløgum og byrjar skal frá Jerúsalem, koma her nakrar hguleiðinga rum nærmissión, sum nattúrliga má vera fyritreytin og venjingin til fjarmissión.

Ein av formonnunum í Kirkelig Forening for den Indre Missión í Danmark, Zewtan, hevur kanska havt missiónsboðini úr Lukasar evangelium í huga, tá ið hann segði tey vísu orðini: »Indre Mission er det første, Ydre Mission det største. Hann sá tað missionerandi arbeiði frá rætta sjónarvinklinum, sá tað soleiðis, sum jesus hevði sett útí kortið.

Yvir um ánna eftir vatni

Orðatakið »At fara yvir um ánna eftir vatni« var ofta havt á munni av langtandi skipsfelagum, tá ið vit sigldu við føroysku fiskiskipunum 10-15 samdøgur, 1.000-1.500 fjórðingar frá heimlandinum til Ný Foundlands, Kanada ella Grønlands køldu, stormbardu strendur, at fiska sama slag fisk sum tann, ið svimur millum okkara egnu oyggjar. Myndin skal ikki pressast, men tað sama ger seg óiva mangan galdandi í tí andaliga fiskiskapinum. Orðatakið skal minna á, at missiónsboðini kunnu misfatast, vendast á høvdið og uppfataði soleiðis, at tað er í Afrika, India ella onkustaðni langt, langt burturi, umsorganin og uppgávan liggur at sýna næstrakærleika, og at har eigur trúboðaravirksemi at byrja. Við myndum í sjónvarpinum eru journalistarnir óførir at lýsa fyriokkum at hetta er rætta raðfylgjan.

Men tá ið Jesus talar um missiónsarbeiði, sigur hann tað øvugta, at byrjast skal frá Jerúsalem, v.ø.o. at byrjast skal har, ein er staddur, í heimbygdini, í grannalagnum í heiminum ja, at byrjað verður við einum sjálvum. Síðani víðkast sjónarringurin nattúrliga.

Ein svii gav fyri nøkrum árum síðani út bók, har hann kagar í bakspeglið. Hanne er sonur hjún, hvørs nørvn eru send um allan heim. Og hava tey tikið ímóti heiðurslønum fyri teirra ídni, eitt nú innan »friðarrørslurnar«. Tey vóru sera væl umtókt uttanfyri landoddarnar. Í bókini kemur høvundurin inn á sítt heim og faðir og móður. Hvat sigur heisn sonurin so um virknu, populeru foreldur síni? Jú, hann skrivar um, at hann ongantíð hevur átt nakað heim, hevur aldri átt nakran pápa ella nakra mammu, tey høvdu ikki stundir at taka sær av honum og vera góð við hann. Teirra kærleiki lá nógvar, nógvar míl frá sær. Ein skelkandi søga frá einum sviknum abrni, ið ikki sær nakran logik og nakað samsvar millum virkni foreldranna úti og so heima.

Tað ber ikki til at skáka sær undan sín ábyrgd við populariteti.

Tað hjálpir síðani heilivágs fyritøkum at skapa sær profitt/vinning við at selja skaðiligan heilivág til øll offrini hjá KT-fyritøkunum í Føroyum.

Tað er eingin av øllum lesarunum, ið hugsar um slíkt, fyrr enn ovseint er at gera nakað, so vit kunna fáa steðga undirgang/ragnarrok/sinnissjúku.

Tað er bara at hyggja at øllum, ið dyrka Guð, mammon og dansa um gullkálvin hjá Kára P., ið fórir til áðurnevnda, tá øll liva í hvørvissjónum.

Tað er eingin, ið skrivar sum ein ger í lesarabrøvum, ið vil hava tykkum at steðga øllum slíkum.

Í tí kristiliga arbeiðinum tykist mangan vera so nógv lættari, at síggja neyðina langt burturi, at elska eitt nú muslimar, hindura rog menniskju, sum annars eru fjarskotin. Men hinvegin so ómetaliga torført at elska í sínum »Jerusalem«, at vera góður við sín granna, at liva í sátt og semju við hann. Eisini er tað so nógv lættari at elska menniskju í øllum øðrum samkomum, meðan tað er so øgiliga trupult at vera góður við sítt egna kirkjulið.

Missión er ikki nakað, ið avgjørt skal fremjast har ávís frástøða er. Í líknilsinum um hin miskunnsama sámariubúgvan, verður sagt um prestin og levittin, at teir góvu sær ikki fær um hitt maltrakteraða menniskja, sum lá í vegjaaranum á tí vegi, teir høvdu sína dagligu gongd. Ella tann ríki maðurin, hann sá ikki hin forpínda Lásarus, ið var honum so nær, at bara gáttin var vorðin eitt óført dýpi, har tað var ógjørligt at koma hvørjum øðrum við, tá ið tað var ov seint at rópa um nærmission.

Vit hava nógvar Lasarusar rundanum okkum har vit dagliga ferðast. Missiónsmarkin liggur fyri durðum okkara. Hóast vit tímiliga hava góð kor, eru rundan um okkum grátandi og ráðaleys menniskju, sum eru nívd av ótta og einsemiskenslu. Ongum nýtist at vera arbeiðsleysur her. Ikki er neyðugt at seta bilin í gongd fyri at finna hesi, enn minni at seta seg í eitt flogfar.

Byrja har vit eru stødd

Halgabók hevur reglurnar hvussu byrjað verður at dríva missión. Frásøgnin í Jóhannesar evangelium 1. 35 ff. tá ið Jesus finnur sær lærusveinar, sigur greitt frá, hvussu missiónsarbeiði byrjar. Heilt einfalt verður sagt um Andrias, ið saman við einum øðrum lærusveini hevði hoyrt orð doyparans: Sí, Guðs lambið! Og hevði havt eitt møti við Jesus og fylgdi honum eftir, at hann finnur fyrst bróður sín Símun og sigur við hann: Vit hava funnið Messias! Tað var náttúrliga reaktiónin uppá tað, sum Andrias hevði uppliva.

Líka síðani syndin kom inn í heimin, hevur hon skilt menniskjuni frá hvørjum øðrum. Fyrsti spurningur á mannaættarinnar morgni ljóðar: Hvar er Áben, bróður tín? Tað er syndin, ið skilir. Vit liva støðugt í einum heimi, her vit koma longri og longri burtur frá síðumanninum, og hvar vit hava trupl.ari og truplari at finna hvønn annan. Ein særdur heimur við hatri tjóðanna millum, við sundurpettaðum átrúnaðarligum samkomum, við upploystum heimum sindraðum barnasálum. Har hjún, hóast tey sita í somu stovu, eru kilometrar frá hvørjum øðrum. Onkur hevur rópt hetta »hin lítli deyðin«, sum tíðum kann kennast svárari enn hin stóri.

Loysnin til hesa miklu vanlukku er avgjørt tann,a t tað verður byrjað frá rætta endanum, at finna hvønn annan aftur, at vit fyrst finna okkara síðumann. Hetta hevði verið til størstu signing fyri øll. Vegurin er einfaldur og framferðarhátturin greiður: Andriast hevur fyrst sjálvur funnið. hann fann Kristus og harvið meiningina við lívinum. Ein, sum skal missionera, má byrja við sær sjálvum. Tað er ivaleyst størsti trupulleikin, at tey, sum bjóða seg fram, ongantíð hava møtt sær sjálvum. Tá ið Andrias hevði sæð guds lambið, varð hann við tað sama sjálvur settur í gongd. Fyrst finnur hann bróðir sín. Her byrjaði tann keturreaktión, sum kann bera heiminum vón, sum eina kann føra til ta fatan, vit spyrja og leingjast eftir. Í hansara egna heimi byrjaði tað, í familjuni byrjaði tað. Áðrenn farið verður undir at realisera teir stóru ynskidreymarnar, at gera verðina betri, at gera samveldir og sameina allar átrúnaðir, átti at verið bytrjað har Andrias byrjaði. Tað næsta stigið vil tá vera heilt náttúrligt – bróðir tín, granni tín, næsti tín, vinur tín, figgindi tín. Andrias finndur fyst bróður sín Símun, næsta dagin finnur Jesus Filippus, og Filippus finnur Natanael. Á so einfaldan og náttúrligan hátt fór fyrsta evangeliseringin fram. Soleiðis byrjaði tað áðrenn talarastólar, pallar og hallir vóru uppfunnar. Soleiðis arbeiddi Jesus sjálvur og soleiðis arbeiddu lærusveinar hansara. Vit hoyra her um 4 menniskju, ið innan eitt samdøgur, hvørt fyri seg, vera funnin og vunnin. Hugsa sær, um her var borið at sum í okkara tíð, við teimum veldigu tiltøkum, við tí risatóli, sum verður sett í gongd, men sum oftast kann samanberast við sápu í springvatni, er løtuvinningur, og ongar varandi fylgir hevur fyri nakran.

Tørvandi nærvera

Tað verður prædika yvir høvdinum á mennsikjum, sum í veruleikanum treingja til persónligt samband. Vit fara longsta veg fyri at finna menniskju, ístaðin fyri at fara Bíbliunnar einfalda veg – beinleiðis til menniskja. Sum Kristus gjørdi. Betri og vakrari dømi um hetta finst ikki, enn samtalan, Jesus hevði við konuna úr Sámariu. Tað er ein meistarlig lýsing av Jesusi í arbeiði. Eitt einastandandi dømi um sálarrøkt og sálarvinning. Hugsa sær, um Jesus var lopin upp á kantin á brunninum og var farin at moralisera fyri hesi konuni, sum vit meta hevði uppibiroið eina dyggiliga fleingju fyri tann ljóta atburð hon hevði sýnt, um hann var farin at dundra niður yvir høvdið á henni við øllum teimum mongu orðunum og keipunum, sum dominera og hava yvirræðið á boðanini í dag. Hvat hevði tá fingist burtur úr?

Nei, Jesus setti seg niður hjá henni, og fór at tosa við hana – hana, sum óiva eingin annar vildi tosa við. Neyvan hevði hann nakað forlorið tannpastasmíl uppi á. Hann var ektaður. Hann setti seg í samband við menniskja í menniskjanum. Ongantíð skeyt hann málið inn fyri alt hetta, sum nýmótans fundarteknikkur peikar á. Hann visti, at djúpt inni í hesum menniskja, var ein tørvur, ein endaligur longsul, sum hungraði eftir sambandi við ein, sum dugdi at skilja hana, og sum kundi gera seg samlíki hennara. Jesus gav sær stundir at lurta meðan hon segði frá. Hann arbeiddi aldri undir trýsti og við skundi við prædikum og menniskjum. Við tí avslappaðu atferð, ið eyðkendi hann og, sum hann møtti henni við, var bygd grund undir at samtalan fekk so stýran týdning. Lívsins veruleiki var ikki goymdur burtur, ella doyvdur av heimsins bakgrundsdundran. Alt lív hennara kom fram í ljósið, og tey bæði komu at skilja hvørt annað, eins og sálarlæknin lurtar seg fram til tað, ið nývir sjúklingin. Hon skilti, at hesin tók seg í álvara og bagatelliseraði einki. Hann fær alt at vita um hana, og hon fær alt at vit um hann: Man hetta ikki vera Kristus? Og so fekk hetta fylgir, fyrst fyri bygdarfólk hennara, seinni fyri allan heim.

Nútíðar menniskju eru deyðatroytt av tí øgiligu propagandu, av teimum hørðu reklamurópunum – verðsligum sum religiøsum, ið tey verða bumbarderaði við samdøgrið runt, av tí øgiliga skundi, menniskja hevur fyri at vinna, fyri at røkka, fyri at náa, ja, fyri at náa…? Menniskjan sær at hon er svikin – svikin av tí mest lovandi boðskapinum. Nútíðar menniskju leingjast eftir samband við medmenniskja, tí teimum tørvar samband. Tað er uppskriftin til nýmótans missión og evangelisatión sum tað var á døgum Krists. Jesus kom til eitt pinkulítið land á heimskortinum. Hann startaði ikki á øgiligum víddum. Arbeiðsøkið hansara var landavegirnir í Palæstina. Hann hevði einki samkomuhús ella talarastól, ongar sekreterar og hjálparsekreterar, ongar skrivarar og samskiftishjálparmenn, onga skrivstovutíð ella viðtalutíð, hann hevði ikki tíð til sovorði. hann var á vakt alt samdøgrið; hann var komin at leita eftir menniskjum sum einstaklingar, leita upp hitt farna og gloymda og at bjarga tí.

Hetta hevur verið uppgávan við tí missionerandi arbeiðinum heilt frá teimum døgum. Líka síðan tá, hevur hesin boðskapur ljóða frá bróður til bróður, frá vini til vin. Símun kom, Filippus kom, Natanael kom – allur ápostlaskarin kom, menn og kvinnur í túsund tali komu, heilar tjóðir komu. Og soleiðis virkar ein missionerandi enn í dag, fyrst í sínum nærumhvørvi, síðani víðkast sjónarringurin.

Sagt verður um Tummas, ein av ápostlunum, sum byrjaði í Jerusalem, og seinni saman við Bartalimeusi legði leiðina eystur eftir, at hann endaði heilt í India. Á egnum beinum hevur hann gingið yvir hetta velduga kontinentið. Og enn í dag sigst vera ein lítil kirkja í suðurindia, sum ber heiðursnavnið Tummaskristin. Hevur nakar uppfylt orðatakið, at brúka ápostlarnar, má tað vera Tummas. Men hann byrjaði frá rætta endanum. Og tað er av størsta týdningi. Eingin verður trúboðari av at fara yvir øll fjøll, um hann ikki fyrst dugdi tað heima. Hevur ein ikki fyrst vant dúliga á heimavølli, man vera lítil dugur í einum á útivølli.